Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 30.09.2022
Mál nr.: 22/14741
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
1. pkt. er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV.	§ 3 c, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.
Stk. 2. Í 2021 og 2022 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.	§ 3 c, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar, í 2025 verða í mesta lagi kr. 52.500 endurgoldnar, í 2026 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar, og í 2027 vera í mesta lagi kr. 17.500 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2028 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið."
	Í § 3 c verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. 3 sett: "Stk. 3. Fyri plug-in hybridakfør, PHEV verða í 2023 og 2024 í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið." Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.
	§ 3 c, stk. 3, sum verður § 3 c, stk. 4, verður orðað soleiðis:

Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024.	"*Stk. 4.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein skal plug-in hybridakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024, meðan el- ella vetnisakfarið skal verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2027."
	§ 2 *Stk. 1.* § 1, nr. 2-4 koma í gildi 1. januar 2023. *Stk. 2.* § 1, nr. 1 kemur í gildi 1. januar 2025.